**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

31. august 2006

Bólkurin at endurskoða búnaðarlóg
c/o Búnaðarstovan

**Att.: Ari Johanneson**

**<u>Evni: Minnilutaálit - útkast</u>**

Yvirlit

**Tilmæli minnilutans** **1**
Arbeiðssetningurin 2
Tilmæli meirilutans 2
Tilmæli minnilutans 2

**Effektivisera fyrisitingina** **3**

**Heimila festarum at keypa ognir** **4**
Broyting í lóg um landsjørð 6

**Endurskoða Landbúnaðarlóggávu** **7**
Broyting í matrikullógini 8

**At selja smærru festini og traðirnar** **11**

**Samanumtøka** **11**

**SKJAL 1 – Grein úr Óðalstíðindum Vol. 3 no. 2.** **12**

## *Tilmæli minnilutans*

Minilutin í bólkinum ger hetta tilmæli.

Heitt verður á aðrar limir í bólkinum um at taka undir við hesum áliti heilt ella partvís.

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

## Arbeiðssetningurin

Í arbeiðssetningi okkara stendur millum annað, at vit skulu:

- ‘Kanna møguleikarnar fyri effektivisering av búnaðarfyrisitingini.’
- ‘Kanna fyrimunir og vansar við at heimila festarum at keypa ognir, sum hoyra til festið, tó ikki innan- og uttangarðsjørð.’
- ‘Gera uppskot til lógarbroyting at heimila nevndu sølu.’
- ‘Gera uppskot til reglur um virðismeting.’
- ‘Endurskoða landbúnaðarlóggávu’
- ‘Kanna fyrimunir og vansar við at jørðin, sum hoyrir til smæstu festini – eisini leigutraðir – kann verða seld.’

Tey fýra fyrstu punktini hoyra til tann táttin, ið hevði styttri freist, hini til tann við longri freist.

## Tilmæli meirilutans

Minnilutin kann ikki taka undir við tilmælinum hjá meirilutanum, tí:

- uppskotið ikki er sannførandi sum landbúnaðarpolitikkur;
- uppskotið ikki er sannlíkt at fáa politiska undirtøku;
- uppskotið ikki er samsvarandi arbeiðssetninginum, serliga øðrum punkti;
- uppskotið ikki er skipað nóg vil til at greiða tey mongu ivamál, ið standast av tí;

Uppskot meirilutans er samanumtikið ‘meiri forering enn privatisering’ og fer at føra við sær stóran vanda fyri spekulasjón, avoyðing av útjaðara og enn fleiri studningsfíggjaðar samanleggingar.

Serliga er minnilutin ímóti at taka av landbúnaðarstevnurnar, ið eru einasta trygd fyri skilagóðum og rættvísum úrskurðum undir verandi skipan, umframt at vera einasta føroyska rættarskipanin.

## Tilmæli minnilutans

Minilutin hevur lokið arbeiðssetningin á henda hátt:

- *‘Kanna møguleikarnar fyri effektivisering av búnaðarfyrisitingini.’*

Mett verður at við selja smærru brúkini, umframt fjós og sethús, kann minkast munandi um fyrisitingina, tí minni verður at fyrisita. Mælt verður til at taka av allan rakstarstuðul.

- *‘Kanna fyrimunir og vansar við at heimila festarum at keypa ognir, sum hoyra til festið, tó ikki innan- og uttangarðsjørð.’*

Mett verður, at stórur fyrimunur er at selja fjós, sethús og leysafæ, bæði fyri land og bónda.

- *‘Gera uppskot til lógarbroyting at heimila nevndu sølu.’*

Mælt verður til áseting, ið nærri verður greinað niðanfyri.

- *‘Gera uppskot til reglur um virðismeting.’*

Mælt verður til áseting, ið nærri greinað niðanfyri.

- *‘Endurskoða landbúnaðarlóggávu’*

Mælt verður til at byrja við sundurbýtingarreglunum í matrikullógini, sí uppskot niðanfyri. Síðani verður mælt til at seta aðrar bólkar at endurskoða og dagføra matrikullóg, útskiftingarlóg og hagalóg. Eisini verður mælt til at brúka verandi rakstarstuðul til onnur endamál.

- *‘Kanna fyrimunir og vansar við at jørðin, sum hoyrir til smæstu festini – eisini leigutraðir – kann verða seld.’*

Mett verður, at tað eru stórur fyrimunur fyri land, hagar, smærru bóndur og traðarfólk at hesi almennu brúk verða seld.

Nú verða einstøku lutirnir í tilmælinum nærri lýstir.

## *Effektivisera fyrisitingina*

Landsjørð, ið búnaðarstovan umsitur, fevnir um knappliga 400 festi. Um 150 festi eru tvær merkur ella minni til støddar, umframt at fleiri onnur partvíst fevna um jørð í høgum, har meirilutin er ognarjørð. Somuleiðis umsitur stovnurin um 500 traðir, harav nógvar eru partvíst almennar, partvíst privatar.

Harafturat eru onnur leigumál, ið ikki fevna um landbúnaðarjørð (t.d. neystagrundstykki). Tey brúkini verða ikki viðgjørd á hesum sinni.

Mælt verður til at selja:

1. Allar traðir.
2. Øll festi, ið eru tvær merkur ella minni til støddar.
3. Alla festijørð uttangarðs, ið liggur í høgum, har meirilutin er ognarjørð.
4. Øll sethús, fjós og alt leysafæ (tó ikki innstøðu), ið fevnd eru av festum ella traðum.

Grundleggjandi fyrimunurin av hesum er at minka stórliga um talið á brúkum, ið búnaðarstovan fyrisitur. Traðirnar vóru í síni tíð lagdar inn við teirri greiðu ætlan og treyt, at tær skuldu gerast ogn, tá tær vóru veltar. Jarðarráðið valdi tó at ganga ímóti traðarlógunum og sáttmálasettu treytunum og gavst í sjeytiárunum at avgreiða sølurnar. Í 1988 eydnaðist at fáa traðarlógirnar avtiknar uttan at áseta nakað í lóg um landsjørð um, hvat skuldi vera av verandi traðum. Við hesum uppskoti verður tann skeivleiki rættaður.

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

Traðirnar, ið eftir eru, eru fyri tað mesta traðir, ið privatfólk í sera drúgva tíð hava brúkt, røkt, bygt; flestar teirra liggja soleiðis fyri, at tað antin ikki er lættliga gjørligt at leggja tær saman við øðrum brúkum; oftast hevði samanleggng verið órímilig, tá atlit verður havt til upprunaligu heimildarlóggávuna, upprunaliga sáttmálan ella aðrar líkar umstøður. Harumframt eigur landið sum nevnt bert ein part av summum traðum (tær eru innlagdar av samlaða markatalinum, t.d. í Streymnesi eigur landi 50%, á Toftum 80% av verandi traðum). Hesar partvísu landstraðir kunnu als ikki brúkast til samanleggingar ella onnur endamál eftir lóg um landsjørð.

Smærru festini liggja uttangarðs oftast í felagshaga saman við ognarjørð. Hetta bland ímillum almennar og privatar ognir er sera óheppið fyri rakstur av og ikki minst felags íløgur í felagshagar, har brúkarar, ið eru ávíkavist eigarar og festarar ikki hava somu áhugamál.

Men í summum førum kann vera talan um brúk, hvørs jørð uttangarðs liggur í haga saman við aðrari landsjørð. Talan kann eisini vera um jørð, ið ætlandi fer at verða tikin til almenn endamál. Talan kann eisini vera um jørð, ið liggur á útoyggj ella á annan hátt eftir meting hjá avvarðandi myndugleikum ikki eigur at verða seld. Tessvegna verða undantøk gjørd frá hesi reglu.

Við hesum verða týðandi royndir gjørdar við sølu, bæði mannagongd, virðismeting, og øðrum viðurskiftum, ið fara at gera spurningin um seinni sølu av t.d. innangarðsjørð hjá størru festunum greiðari.

## *Heimila festarum at keypa ognir*

Eyðsýnt er, at fyrimunir eru at lata bøndur sleppa at ognast tey rakstrargøgn, ið týðandi eru fyri brúk teirra.

Festiskipanin er í sjálvum sær einføld. Festari fær festi fyri symbolskt gjald og eigur allan vinning av tí, men má lata tað frá sær aftur við teimum ábótum og íløgum, hann hevur gjørt við smáum møguleikum fyri at fáa nevndu ábøtur og íløgur viðurlagdar.

Bóndi hevur stóran fyrimun av verandi skipan at fáa festið í síni heild til brúks fyri nærum onki gjald. Bóndin eigur allan tann vinning, ið hann kann skapa sær burtur teimum aktivum, ið hann fær ókeypis uttan kapitalútreiðslur. (Bóndin kann kortini hava slíkar, um hann sjálvur hevur játtað at átaka sær tær).

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

Tá talan er um sethús og fjós er støðan óheppin, tí bóndin bindur partvíst vinning sín í ognum, sum landið hevur ognarrættin til. Støðan hjá bóndanum mótvegis lánveitara, næsta festara, tí almenna (búnaðarstovu, búnaðargrunni, kommunu, øðrum myndugleikum) er antin ógreið ella óheppin.

Tá talan er um bø og serliga um haga, er støðan ikki á eins órímilig fyri bóndan. Støðan er rættiliga greið, og bóndin ger vanliga ikki íløgur, ið binda vinning og pening hansara í ogn hjá landinum.

Minnilutin mælir tí til í fyrstu atløgu onki at gera við spurningin um uttangarðs jørð í einbýttum landshøgum ella felagshøgum, har meirilutin er landsjørð.

Minnilutin ásannar, at jørð innangarðs fellur uttanfyri arbeiðssetningin.

Fyri bøndur, ið reka fjós við neytum, umframt bøndur, ið reka annað virksemi tengt at bygningum, er sera umráðandi at sleppa burturúr verandi støðu, har landið ognast allar ábøtur og virðisøkingar, ið bóndins fíggjar og fremur.

Fyri bøndur, ið vilja umskipa skuld sína í búnaðargrunninum, og fyri almenna kreditvirði hjá bøndum, er sera umráðandi at fáa ognarrætt til mest týðandi aktivini. Á henda hátt verður realtrygd fyri lánum og kreditti.

Fyri flestallar bøndur er týðandi at sethúsini gerast ogn, so bústaðarviðurskifti teirra ikki fløkjast uppí landbúnaðarliga raksturin.

Minnilutin er sannførdur um, at hepnasta skipan er, at bygningar, ið seldir verða, verða seldir við hóskandi grundøki, ið tryggjar at bygningarnir lúka krøv í byggi/býarskipan, brunareglum og øðrum, umframt at pláss verður fyri ávísum útbyggingum.

Bólkurin hevur í kanningum sínum eisini staðfest, at ikki ber til vegna eindargrundsetningin í donsk-føroyskum ognarrætti at selja bygningar omanav jørðini. Til ber at leiga grundstykki út til bygningar, ið kunnu skrásetast við egnum matrikulnummari sum bygningur á leigaðum lendi. Men til ber ikki hjá landinum ella landsstovni at selja bygningin omanav, tá bygningur og grundøki hava sama tinglisna eigara. Tí er heldur ikki í samsvar við galdandi rættarstøðu at gera annað enn at selja bygningar við hóskandi undirlendi.

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

## Broyting í lóg um landsjørð

Minnilutin mælir samsvarandi til hesa nýskipan av § 11 í lóg um landsjørð.

**Uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð.**

§ 1. Verandi § 11, stk. 1 verður § 10, stk. 6. Sum nýtt stk. 7 verður ásett:

"

*Stk. 7.* Búnaðarstovan fær heimild at lata øðrum landsstovni til ognar festi ella part av festi, ið er ætlað at verða brúkt til friðingar, frítíðarendamál ella onnur almenn endamál, hetta skal serliga gerast í samband við festiskifti. Landsstýrismaðurin skal leggja fram lógaruppskot um at selja kommununum festi ella partar av festum, ið neyðug eru til tess at skipa kommunalar útbyggingar, byrjast skal við festunum í markatalsbygdunum í Tórshavnar kommunu. Hetta lógaruppskot skal hava reglur um endurgjald til festarar fyri mista inntøku, umfram allar aðrar neyðugar treytir.

"

§ 2. § 11 í verður orðað av nýggjum:

"

**§ 11.** Búnaðarstovan fær heimild at selja sethús, fjós og aðrar bygningar og lendi í samband við hesar bygningar. Búnaðarstovan kann selja verandi festara/leigara nevndu bygningar ella bjóða hesar bygningar út til almenna sølu, um festi er leyst, og ongin eigur framíhjárætt sambært § 4, stk. 2. Saman við bygningi verður selt somikið av grundøki, at bygningurin lýkur krøvini í viðkomandi býar/bygdarskipan ella byggiætlan, umframt at nakað pláss skal vera fyri um- og útbyggingum. Seyðhús, rættir og aðrir tílíkir bygningar uttangarðs eru ikki fevndir av hesi áseting.

*Stk. 2.* Búnaðarstovan fær heimild at selja traðir og festi, ið eru tvær merkur ella smærri, umframt landsjørð í høgum við meiriluta av ognarjørð. Búnaðarstovan kann selja verandi festara/leigara nevndu traðir og festi ella bjóða hesar bygningar út til almenna sølu, um festið ella trøðin eru leys, og ongin eigur framíhjárætt sambært § 4, stk. 2. Búnaðarstovan kann gera av ikki at selja festi eftir hesi áseting, um so er, at atlit til felagsrakstur, útoyggjar, búseting, byggi- ella býarskipan ella atlit eftir hesi lóg ella onnur týðandi almenn atlit tala fyri tí.

*Stk. 3.* Selur Búnaðarstovan verandi festara/leigara bygningar sambært stk. 1 ella stk. 2, skal prísurin ásetast til varliga mett marknaðarvirði. Fyri hvørt ár festarin/leigarin ella festarar/leigarar undan honum samsvarandi skipanini við framíhjáréttindum eftir § 4, stk. 2 hava sitið við festinum/leigumálinum verður prísurin lækkaður 1%, tó ikki meira enn til helvtar. Fæst ikki semja

við festara/leigara um prísin, skal sorinskrivarin tilnevna tríggjar metingarmenn, ein eftir tilmæli frá hvørjum parti, hin triðja at vera ástøðumann. Bæði búnaðarstova og festari kunnu innan seks vikur leggja niðurstøðuna hjá metingarmonnunum fyri landbúnaðarstevnu.

*Stk. 4.* Hóast ásetingina í § 5 í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn fellur sølupeningurin sambært hesi grein til landskassans og fer ikki í búnaðargrunin.
“

§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

*Nærri viðmerkingar verða at gera.*

Serliga um ásetingina “at selja kommunum festi ella partar av festum, ið neyðug eru til tess at skipa kommunalar útbyggingar, byrjast skal við festunum í markatalsbygdunum í Tórshavnar kommunu” verðu víst til hjáløgdu grein úr óðalstíðindum.

## *Endurskoða Landbúnaðarlóggávu*

Mælt verður til at endurskoða ymsu lógirnar, ið týðandi eru fyri landbúnaðin, at settir verða arbeiðsbólkar at nútíðargera og endurskoða matrikullóg, útskiftingarlóg og hagalóg.

Eisini verður mælt til at taka av verandi rakstrarstuðul. Slíkur stuðul avlagar altíð vinnulívið, umframt at sølan av mjólkarkvotum hevur við sær, at studningurin verður kapitaliseraður. Bóndin, ið keypir, má viðurleggja nútíðarvirði av tí væntaða framtíðar studninginum, bóndin, ið selir, fær tað kapiliseraða virði av studninginum afturfyri onki at gera.

Landið eigur heldur at brúka peningin á henda hátt:

- skipa fyri útbúgvingartilboðum, eisini til teirra, ið fáast við felags-, smá- og áhugabrúk;
- skipa fyri kanningum av djórasjúkum, hesar vóru tíverri spardar burtur;
- skipa fyri ráðgeving viðvíkjandi aling, fóðri, heilivági og dyrking;
- skipa fyri, at grasfræ og tøð verða latin høgunum at nýta í skriðum, moldeygum og aðrastaðni at fyribyrgja jarðildisoyðing;
- skipa fyri træplanting;
- skipa fyri friðing av ávísum økjum, so at lendi umboðandi øll sløg av føroyskari náttúru verða varðveitt;
- skipa fyri at virka føroysku ullina til teppir at brúka til menningar- og kreppuhjálp;
- skipa fyri at hegna ferðslumestu landsvegirnar inni;
- skipa fyri at stuðul verður veittur til menning av vinnulívi og livilíkindum á útoyggj.

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

Fyrsta og mest átroðkandi lógarbroytingin er tó broyting í matrikullógini, so jørðin gerst umsetiligari.

Minnilutin ásannar, at matrikulreglurnar eru sera stórur vansi fyri ognarjørð og felagshagar. Matrikulreglurnar merkja, at ognarlutir verða tengdir saman móti áhugamálunum hjá eigarunum, at virði á ognum minkra munandi, at jørð liggur fyri onki, tí eigari sleppur ikki av við hana, og at ognir gerast størri enn bæði, hvat fríur marknaður hevði viðført, og hvat er best fyri felagsrakstur av høgum.

Minnilutin staðfestir, at matrikulskipanin er skipað øvugt av aldargomlu fatan føroyinga av jørð. Longu í brævi frá kongi um 1271 verður viðurkent, at føroyingar hava egnar búnaðarlógir, sum "lógbók tykkara sjálvs váttar áður." Eftir føroyskari fatan er jørð mett í áljóðandi virði í markatali. Til ber síðani at eiga størri ella minni part av markatalinum. Tann jørð ella tey lunnindi, ið farin er burturav markatalinum, eiga heldur ikki óneyðuga at tengjast at markatalinum. Innangarðsjørð eigur bert at metast í fermetrum men eigur vegna atlit til brúksvirði og byggi-/býarskipan ikki at verða býtt sundur ov smátt ella í ov óhendugar eindir.

Tessvegna mæli minnilutin til, at eigarar sjálvir sleppa at ráða fyri:

- Hvørt teir skilja sundur jørð metta í markatali frá frábýttari jørð metta í fermetrum. Til skal bera at skilja innangarðs og uttangarðs í egnar matrikulognir við egnum matrikulnummari.
- Hvørt teir skilja sundur ognir metta í markatali. Minstamark verður tó ásett til ein gyllin. Hetta merkir eyðvitað ymiskt virði og ymiskt avkast í ymsum høgum og bygdum, men onnur skipan verður ov torgreidd og fremmand. Heilur gyllin er í flestu bygdum somikið hendug eind, at til ber at savna sær hóskilig fald (tveir gyllin, fjórðingsmørk, hálvmørk, heilar merkur ella annað).
- Hvørt teir vilja skilja markatalsognir í ymsum høgum sundur.
- Hvørt teir vilja býta sundur ognir innangarðs mettar í fermetrum. Tó verður mælt til minstustødd, ið kann vera ymisk í ymsum bygdum.
- Hvørt teir vilja hava hvønn lut innangarðs at vera skrásettan sum sjálvstøðuga matrikulogn (hava egið matrikulnummar).

## Broyting í matrikullógini

Minnilutin mælir tí til hesa broyting í matrikullógini:

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

**Uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.**

§ 1. Í § 16 verður sett inn sum nýtt stk. 2:

"

*Stk. 2.* Eftir tilmæli, grundað á atlit til rakstur av jørð, ferðsluviðurskifti, umhvørvi, byggi- og býarskipan og annars tey í § 17 nevndu atlit, frá viðkomandi kommunu skal matrikulstovan geva ta í § 15 nevndu sundurbýtisgóðkenning í hesum førum:

a) tá ognin fevnir um fleiri ymsar lutir innangarðs;
b) tá ognin fevnir um jørð bæði innangarðs og uttangarðs;
c) tá ognin fevnir um uttangarðsjørð í ymsum høgum;
d) tá ognin fevnir fleiri gyllin uttangarðs;
e) tá ognin kann býtast í fleiri lutir innangarðs minst 5.000m² til støddar; grannastevna kann samtykkja lægri minstustødd innangarðs.

"

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

**Viðmerkingar**

Uppskotið hevur við sær, at heimildin at meta um sundurbýti verður flutt út til kommunurnar, ið frammanunda sita við myndugleika at gera bygdar- og býarskipan.

Við hesum verður miseydnaða royndin at skipa føroysku ognarjørðina í stórar vinnuligar eindir slept. Sannast má, at eftirspurningurin í Føroyum er mest eftir smáum brúkum, sum í flestu førum eru áhugabrúk ella parttíðarvinna. Hesi brúk verða best skipaði við at fólk sjálvi keypa, leiga ella á annan hátt fáa ræði á teirri jørð, teimum tørvar og nýtist, og samsvarandi at tað er lætt at selja at umskipa ta jørð, ið fólk ikki hava umstøður at røkja, meðan tey varðveita ta jørð, tey vilja brúka.

Fyri vinnubøndur fer uppskotið hinvegin at merkja, at teir lættari sleppa at keypa ognarjørð, sum ikki verður brúkt í dag, tí hendan nú kann býtast frá og seljast ella leigast sum egin matrikulogn.

Høvuðsteksturin í ásetingini leggur dent á, at sundurbýti skal vera grundað á:

- atlit til rakstur av jørð,
- ferðsluviðurskifti,
- umhvørvi,
- býarskipan

- tey í § 17 nevndu atlit (byggi-, býarskipan, brunaviðurskifti, fornminni, ferðsla, minstastødd á grundstykkjum, o.t.)

Eftir § 15 krevst sundurbýtisgóðkenning til tess at selja, veðseta ella lata brúksrættingi í fleiri enn 10 ár.

Heimildin at meta um hesi atlit skal eftir hetta fyrst og fremst liggja hjá viðkomandi kommunu, men kortini skal metingin staðfestast og avgreiðast á matrikulstovuni, og vera rættarkrav hjá eigaraunum undir hesum umstøðum (um ikki omandfyri nevndu atlit tala ímóti):

- tá ognin fevnir um fleiri ymsar lutir innangarðs;
- tá ognin fevnir um jørð bæði innangarðs og uttangarðs;
- tá ognin fevnir um uttangarðsjørð í ymsum høgum;
- tá ognin fevnir fleiri gyllin uttangarðs;
- tá ognin fevnir um so stóra vídd innangarðs, at nýggir lutir minst 5.000m² til støddar kunnu útstykkjast; hetta tal skal kunna vera lægri í teimum markatalsbygdum, har tað verður samtykt.

Hetta merkir, at um ikki tey fyrru nevndu atlit til ferðslu, býarskipan osfr. tala ímóti, so skal loyvi gevast til sundurbýti – og harvið til nýtt matrikulnummar – tá:

a. Fleiri stykki innangarðs hava sama matrikulnummar. Hesi stykki kunnu nú fáa hvør sítt egna matrikulnummar, ið hvørt eisini kann fevna um uttangarðsjørð.
b. Skilagott er at skilja sundur innangarðs og uttangarðsjørð. Eigarin kann velja at lata bøin fáa egið matrikulnummar, meðan uttangarðsjørð fær sítt egna matrikulnummar.
c. Fólk eiga jørð í fleiri høgum. Ognin í hvørjum haga kann nú fáa egið matrikulnummar.
d. Eigari eigur nógva uttangarðsjørð. Vanliga grundeindin uttangarðs er ein gyllin, við hesum kann hvør gyllin – um eigarin vil tað – fáa sítt matrikulnummar.
e. Eigari hevur sera stóra ogn innangarðs. Hvørt hóskiligt stykki – 5.000m² ella størri – kann við hesum fáa sítt sítt matrikulnummar.

Fyrimunurin við nýggju skipanini er, at tað verða fleiri eindir og liðiligari umsiting. Neyðugt verður ikki við ummæli frá kommunu, sundurbýtingarloyvi, fyribils matrikulnummari og treytaðum skeyti, osfr., tá ein eigari vil selja øðrum ein lut innangarðs ella nakrar gyllin uttangarðs. Heldur verður tað upp til kommunu og matrikulstovu at skipa minstueindirnar, sum eigararnir síðani frítt kunnu umseta.

Í samband við arvaskifti ella upploysing av samogn, fer nú nógv læ ttari at bera til at býta størri jarðarognir sundur, so sleppast kann undan óhóskandi samognum. Eisini kann læ ttari sleppast undan útskifting og øðrum meiri umfatandi umskipanum, um tað ber til at býta sundur og síðani keypa, selja og makaskifta ognir, so hvør eigari so vítt til ber fær jørðina hjá sær at liggja á tí stað innangarðs og í tí haga uttangarðs, sum viðkomandi sjálvur heldur verða frægast.

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

## *At selja smærru festini og traðirnar*

Samsvarandi útgreiðningum omanfyri verður mælt til nevndu nýskipan av § 11 í lóg um landsjørð.

## *Samanumtøka*

Minnilutin hevur við hesum lokið arbeiðssetningin og vónar at politisku myndugleikin fer at velja hesi tilmæli framum tey hjá meirilutanum.

Vinarliga

Kári á Rógvi

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

## *SKJAL 1 – Grein úr Óðalstíðindum Vol. 3 no. 2.*

# Nogle vare alt gangne paa Trøen

- Kári á Rógvi

Í grindavísuni verður tikið til um havnarmenn, at "nogle vare alt gangne paa Trøen." Eyðvitað hava havnarmenn verið millum ídnastu traðarmenn frá heilt gamlari tíð. Valaverkið um Havnar Søgu greiðir nógv frá hesum viðurskiftum. Týdningurin av traðunum hevur verið fleirfaldur. Fyri tað fyrsta sjálvt avkastið av traðunum, mjólk, kjøt, ull, avgrøði og annað. Síðani við ognarrættinum kapitalur – tað er ikki av tilvild, at trappubrøðurnir og aðrir havnarmenn vóru millum fyrstu føroysku reiðarar, tí føst ogn kann setast í veð og harvið skapa kapital, samstundis sum eigarin framhaldandi rekur ognina og fær avkast av henni. (Bókin the Mysteri of Capital hjá Hernando de Soto greiðir frá, hvussu greið og einskild ognarviðurskifti eru týðandi fortreytir fyri búskaparligari menning).

Harumframt eru traðirnar og onnur jørð við at byggja upp gangliga mentan, røkiskap, náttúruans og samanhald. Hesin týdningurin økist alsamt í nútíðini. Tey, ið arbeiða innandura, sitandi ella eru farin frá vegna aldur, hava øll fyri neyðini at takast við okkurt handaligt. Trøðin er gagnlig fyri likam eins og sál – at bíða eftir at gásin kemur út, síggja bløðkurnar næla ella eygleiða smálombini spæla; ongi orð kunnu siga frá, hvussu eymt slíkt rørir hjartastreingir.

**Traðarmannafelagið**
Í Havn er traðarmannafelag, sum hevur omanfyri hálvtannaðhundrað limir. Teir traðarmenn, ið hava leigutraðir frá Tórshavnar kommunu, hava felagið at umboða seg í felags málum mótvegis kommunini. Men felagið hevur eisini aðrar limir, teir, ið eiga ognartraðir, teir, ið sita við traðum av kongsjørð, og óðalsmenn.

Ofta eru fleri um eina trøð, og telja vit saman øll tey, ið leiga ella eiga traðir í Havn, umframt øll óðalsfólk búsitandi í Havn, og leggja afturat tey fleiri hundrað fólkini, ið standa á bíðilista at fáa trøð frá býráðnum, so er talan um túsundtals fólk, ið fáast – ella vilja sleppa at fáast – við jørð í Havn. Jarðarbrúk í smáum, um talan er um at velta, hava seyð, ross, gæs, hønir ella, hvat hugsast kann, kann sostatt sigast vera millum best umtøktu frítíðaráhugamál í Havn eins væl og á bygd.

Í vár var eg á fundi hjá traðarmannafelagnum og helt fyrilestur um ymisk viðurskifti í samband við traðir. Tað verður ov drúgt at endurtaka alt, ið sagt var. Á hesum sinni skal eg loyva mær at taka

upp spurningin um, hvussu vit fáa meiri búnaðarjørð til vega til øll hesi fólk, fyrst og fremst við at seta á hagarnar íkring Havnina. Sum Havnin nú er bygd við øllum teimum bygdum, ið komnar eru uppí kommununa, so eru sera nógvar hagar, ið liggja uppat bygdum øki í kommununi.

**Lov om salg af AAlekær**
Men onki er nýtt undir sólini. Longu í 1931, var býurin somikið vaksin, at politisk støða varð tikin til, hvat skuldi gerast. Tá varð lóg samtykt á ríkisdegi. (Sí www.logir.fo, brúka einføldu leitingina, skriva "Ålekær"). Henda lóg ásetir stutt og greitt, at "Thorshavn Kommune" slapp at keypa Álakerisfestið – uttangarðs Flatnahaga, tann størra hagan í marktalsbygdini Tórshavn. Hetta er tí í dag einasti ognarhagi í Suðurstreymi. Garðurin var áður embætisgarður hjá amtmanninum. Nakrar treytir vórðu kortini settar við søluni:

- uppisitarin skuldi hava endurgjald;
- jørðin, ið hospitalið brúkti, varð undantikin;
- verandi traðarmenn skuldu kunna keypa traðirnar, tá ¼ var veltur, fyri 100 krónur kúfóðrið;
- serligar reglur vóru um avloysing av vetarbiti;
- landið skuldi hava rætt at keypa Debessartrøð;
- kommunan skuldi gjalda statinum kr. 55.000 umframt rentur yvir langt áramál;
- tá kommunan sjálv seldi traðir og byggilendi, skuldi helvtin av prísinum gjaldast sum serligur avdráttur uppá skuldina til statin;
- ...og servituttur skuldi tinglesast um forboð móti "Trankogerier, Fisketørrepladse eller anden for Hospitalet skadelig Virksomhed."

Lógin er í 6 paragraffum og fyllir knappa A4-síðu.

**Seljið kommuni hagarnar kring Havnina**
Við hesi stuttu lóg hava vit eitt gott fyridømi, tá ræður um, hvat vit skulu gera við jørðina kring Havnina og onnur stórpláss:

- kommunan kann keypa í stórum – fleiri hagar;
- festarar fáa ríkiligt endurgjald;
- jørð verður løgd av til landsstovnar og serlig endamál;
- traðir verða lagdar inn;
- vetrarbiti avloyst;
- kommunan skal hava skyldu at selja undir ávísum umstøðum;
- aðrar treytir verða álagdar.

Hvussu so við tí vinnuliga jarðarbrúkinum? Jú, fyrst er greitt, at tað eru mest bøurin og fjósini, ið geva pengar av sær. Teir ídnu mjólkarbøndurnir hava flestir longu seyðamenn og fjallmen, sum í roynd og veru reka seyðabrúkini. Siga vit, at ein miðal bóndin vinnur 30-50.000 kr. uppá seyðin, ja so er roknistykkið einfalt; bóndin fær hesa upphædd í árligum endurgjaldi, til hann hevði farið frá fyri aldur – ella eina størri upphædd í hondina alt fyri eitt. Kommunan skal ikki selja nógv

**Føroya Óðalsfelag**
**Postboks 2080**
**165 Argir**

grundstykki fyri kunna rinda hesa upphædd, og bóndin kann framhaldandi reka fjósið við neytum (sum teir kunnu keypa frá landinum). Í summum førum er býurin komin so nær fjósinum, at tað heldur ikki ber til, men so verður endurgjaldið somikið størri. Sethúsini skuldu teir fingið bíliga, stóra trøð og allar góðar sømdir, so teir fóru væl.

Fyri Tórshavnar kommunu hevði hetta merkt, at hon kundi ogna sær ríkiliga jørð til byggilendi í nógv ár, umframt at jørð var til stovnar hjá landinum; eisini friðingar av serligum økjum og skógplanting kundi farið fram í somu viðferð.

Nú spyr onkur, hvat skal vera av brøttum, óhøgligum lendi ella økjum, har vegur ikki er. Fleiri møguleikar eru. Nógv høvdu ikki takkað nei til eina bratta trøð, tí fyri mong okkara er tað at ganga burtur úr bygdum øki at hyggja til seyðin týðandi partur av stuttleikanum. Men til ber eisini at lata fólk fáa frælsi í høgunum. Hugsið tykkum, um traðarmenn í Havn kundu biða um tvey summarfrælsi í part í Flatnahaga; so fóru ærnar í hagan eftir lembing, og eigararnir fingu síðani fjallboð í áseyðaroyting og skurð. Onkur hagi kundi heldur verið seldur aftur sum ognarhagi, tá kommuna hevði tikið sítt, so havnarmenn loksins høvdu møguleikan at keypa jørð nærhendis hjá sær sjálvum.

**Raðfesting**
Gera vit onki at fáa til vega meiri jørð, so verður ov lítið av jørð til at øll kunnu fáa tað, ið tey vilja hava. Stórt vandmál er í løtuni, at teir, ið hava leigutraðir frá kommununi, vilja hava at eftirkomarar teirra skulu kunna taka við leigumálinum – ella kanska beinleiðis keypa traðirnar. Hetta er væl skiljandi, tí tað hevur kostað bæði pengar og stríð at velta, hegna, byggja úthús, og á annan hátt betra og røkja trøðna. Men tað er eisini skiljandi, at tann, sum stendur sum nummar 117 á bíðilistanum hjá kommuni – og hevur staðið har í áravís – ilskast, um onkur annar sleppur framum í raðnum.

Einasta loysnin er at fáa til vega meiri jørð til ‘Jógvan den Havnemand’ og ‘de flittige Drenge’. Loysnin er longu uppfunnin. Tað krevjast bara ein A4-síða við teksti og tríggjar samtyktir á løgtingi. Onki er nýtt undir sólini.